## Samanlagdi stovnurin




*Elin Heinesen er stjóri á SamVit*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Mikudagin 2. mai var almenn móttøka á Bryggjubakka 12 í Havn í sambandi við at Elin Heinesen er sett sum stjóri á samanløgdu stovnunum Ferðaráð Føroya og Menningarstovuni. Samanlagdi stovnurin hevur fingið navnið "SamVit"

Stjóri á "SamVit" er Elin Heinesen. Hon er 48 ára gomul og úr Havn. Elin er cand. mag. við høvuðsgrein í 'æstetik og kultur' og hjágrein í "norðurlendskum máli og bókmentum" Harumframt hevur hon tikið filmshandrithøvundatbúgving á (Den Danske Filmskole) og framhaldsútbúgving í vinnulívsbúskapi á (Copenhagen Business School).

Elin hevur búð í Keypmannahavn í 23 ár, har hon hevur havt fleiri avbjóðandi størv.

Tá Elin søkti starvið sum stjóri á samanlagda stovninum, sat hon í starvi í Danmark sum blaðstjóri fyri eitt av mest lisnu forbrúkarabløðum – KIWI magazine.

Tað var Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sum avdúkaði nýggja navnið hjá samanlagda stovninum: "SamVit". Navnið skuldi vera stutt og greitt og lætt at siga og hoyra. Tað skal kunna úttalast av útlendingum og lýsa endamálið við stovninum.

• Vit hava meira frá móttøkuni fyrst í komandi viku.

**mg**

# Fiksur handil við Norðskála

Týsdagin 1. mai læt nýggi handilin "FiX´t" upp við Norðskála.

FiX´t er ein handil, ið selur undirklæði og prýði til konufólk sum t.d. hálsbond og hárprýði. Tað eru Elin Vang á Oyrarbakka og Oddvør Ottosen í Haldórsvík, sum eiga og reka handilin.

Elin og Oddvør hava báðar arbeitt í matvøruhandli, og nú vildu tær royna okkurt nýtt.

Tær hava sæð tørvin á einum slíkum handli í økinum, og rokna við at "FiX´t" verður væl móttikin.

"FiX´t" er í hølum, har sum handilin "Stanley" var áður. Handilin er opin soleiðis: mánadag til fríggjadag frá kl. 10-17.30 og leygardag frá kl. 10-14.

**mg**



*Oddvør Ottosen og Elin Vang eiga og reka handilin FiX´t við Norðskála*

*Mynd: Rólant Waag Dam*

## Eftirlýsing

Ì sambandi við at Jórunn Dánialsdóttir savnar myndir av lærarum og mæmingum í "Færøernes Mellem- og Realskole" í tíðarskeiðnum 1916 til 1966, sóknast hon eftir myndasøvnum hjá lærarunum Richardi Long og Jógvani við Ánna. Hesi myndasøvn eru lánt út, og eingin veit hvør hevur tey. Í hesum søvnum eru myndir av næmingunum, sum teir vóru lærarar hjá.

Tey sum vita um hesi myndasøvn, verða vinarliga biðin um at seta seg í samband við Jórunn Dánialsdóttir á tel. 316024 ella 226024.

## Meira um handlar

Í komandi viku hava vit meira um nýggjar handlar við Skálafjørðin.

Færøernes Mellem- og Realskole:

# Fjórði millumskúlaflokkur í 1938

Í sambandi við eina framsýning sum verður á ólavsøku í ár, í gamla realskúlanum í Havn, leitar Jórunn Dánialsdóttir eftir myndum av lærarum og mæmingum í "Færøernes Mellem- og Realskole" í tíðarskeiðnum 1916 til 1966.

Jórunn heitir á tey, sum eiga myndir frá hesum tíðarskeiði, um at ringja til sín á tel. 316024 ella 226024. Adressan er Sílagøta 3, FO-100 Tórshavn. Myndirnar kunnu eisini latast inn (navnmerktar) í Wrangler Shop í N. Finsensgøtu 23 (tel. 314710).

Jórunn sigur, at arbeiði hevur gingið væl, men enn vanta nógvar myndir. Tíðarfreistin er sett til 10. juni, og Jórunn heitir á fólk um at koma við myndunum skjótast til ber.

Í dag hava vit hesa myndina av næmingum í 4. millumskúlaflokki í 1938.

Aftasta rað f.v.: Karin Wellejus (g. Heik, býr í Kansas USA), Margit Lava Hansen (g. Hildebrand), Gudrun Djurhuus (g. Rubeksen), Lisa Eystberg (g. Michelsen), Guðlaug Helmsdal (g. Rayer) og Solveig Lava Hansen (g. Hildebrand).

Triðja rað f.v.: Ásla Pállsdóttir Hansen (g. Joensen), Ester Rein (g. Williamson, býr í London), Leivur Andreassen, Aksel Juul (sonur apotekaran), Evald Fugløø, Hans Hansen (hjá Poul Hansen), Árni Olsen (sálarlæknin) og Erik Juul (sonur apotekaran).

Annað rað f.v.: Paulina (Minna) Michelsen, Mary Wikkelsøe (hálvdonsk), Ingrid Olsen (g. Olsen), Solveig Joensen (g. Dam), Poul Sørensen (sonur Zacharias Sørensen) og Richard Long, lærari.

Fremsta rað f.v.: Christian Haraldsen (Bassi), Trúgvi Árting, Petur Christiansen, Sverri Hansen (Trónd), Petur F. Christiansen og William Sloan

Um onkur hevur okkurt at viðmerkja í samband við hesa myndina, er viðkomandi vælkomin at kontakta Jórunn.

*Myndaeigari: Solveig Dam*

